tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2017 |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Kambskarð Sørensen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum | 2 |
| 2 | Kommunulæknaviðurskifti á Tvøroyri | 2 |
| 3 | Dagførd starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar kommunu | 3 |
| 4 | Dagføring av kommunustýrisskipanini | 4 |
| 5 | Umsókn frá TB fótbóltur um stuðul | 5 |
| 6 | Áheitan á kommununa, um at hýsa almennum stovnum | 6 |
| 7 | Tilmæli um bygginevnd í.s.v. fyrireiking av útbygging av barnagarði | 7 |



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2017 |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-I00-1-17**

## 1. Samanbering av skattatølum

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar og samanber skattatølini fyri februar.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina hjá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2016-2017.xls
- Samanbering av skattatølum við undanfarin ár

**29.00.00-A00-1-17**

## 2. Kommunulæknaviðurskifti á Tvøroyri

### Málsfrágreiðing

Sosiala nevnd ynskir, at viðurskifti kring kommunulækna-embætið viðvíkjandi hølið og læknum verða umrødd á býráðsfundinum. Umboð fyri kommunulækna-embætið á Tvøroyri vóru á fundi við sosialu nevnd tann 27. februar í ár, sí viðfestu skjøl.

Sambært leigusáttmála millum Suðuroyar Sjúkrahús og Tvøroyrar-, Fámjins- og Hvalbiar kommunu frá 1994, sum er dagførdur síðsta heyst, stendur í § 6, at "innanhýsis viðlíkahald av tí leigaða, er fyri leigarans rokning, meðan viðlíkahald uttan - um annað ikki er serliga avtala - er fyri eigarans rokning", sí viðfesta leigusáttmála.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 3/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Sosiala nevnd, 27. februar 2017, pkt. 1:**

Sosiala nevnd tók kunningina frá kommunulækna-embætinum til eftirtektar, og metir málið er átrokandi við at fáa bøtt um hølisviðurskiftini í viðtaluhølinum hjá kommunulæknanum. Sosiala nevnd ynskti, at verandi leigusáttmáli verður eftirhugdur við atliti til, hvør ið hevur skylduna til viðlíkahald. Av tí at málið er átrokandi, beindi sosiala nevnd málið beinleiðis víðari til Býráðið til umrøðu og støðutakan.

### Avgerð

Býráðið mælir til, at umboð fyri kommunurnar í Suðuroynni møtast á fundi saman við kommunulæknunum í oynni. Hesin fundur skjótast til ber.

### Skjøl

- Svar frá kommunulæknanum á Tvøroyri
- Kunning í sambandi við telefonprát fyrrapartin við Dorrit Bech Joensen viðvíkjandi ynski hjá sosial.
- Notat frá fundi við umboð fyri kommunulækna-embætið
- Leigusáttmáli ml. Suðuroyar Sjúkrahús og Tvøroyrar kommunu
- Samskifti við Arnhold Jensen um fund
- Samskifti við Dorrit Bech Joensen um fundartíðspunkt

**00.01.10-A00-3-17**

## 3. Dagførd starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

2. viðgerð av broyting í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar kommunu.

**Býráðið, 13. februar 2017, pkt. 5:**

Býráðið samtykti við 1. viðgerð, at fylgja tilmælinum frá kommunustjóranum um, at gera broytingar í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar kommunu viðvíkjandi samanseting av setanarbólki.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 3/2017 |
| --- | --- |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 6. mars 2017, pkt. 3:**

Fíggjarnevndin mælir til, at pkt. 3 í starvsfólkaskipanini verður umorða soleiðis, at eitt fólkfrá umsitingini skal verða limur í setanarbólkinum og at tað er kommunustjórin, ið velur út eitt starvsfólk í umsitingini til at vera limur í setanarbólkinum, tá rakstrarstøð skulu seta starvsfólk í starv.

### Avgerð

Býráðið samtykti við 2. viðgerð einmælt dagføringina av starvsfólkaskipanini.

### Skjøl

- Dagførd starvsfólkaskipan til Býráðið
- Notat til Tvøroyrar Býráð í sambandi við 1. viðgerð av broytingum í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyr

**00.01.10-A00-2-17**

## 4. Dagføring av kommunustýrisskipanini

### Málsfrágreiðing

2. viðgerð av uppskoti til broyting í kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu.

**Býráðið, 13. februar 2017, pkt. 4:**

Býráðið tók einmælt undir við at gera nevndu broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu, sum lýstar eru í viðfesta notati frá kommunustjóranum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt við 2. viðgerð dagføringina av kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2017 |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Skjøl

- Dagførd kommunustýrisskipan
- Viðmerkingar frá Lasse Jensen
- Viðmerkingar frá Bjarna Nygaard
- Dagførd kommunustýrisskipan
- Notat til Tvøroyrar Býráð í sambandi við 1. viðgerð av broyting í kommunustýrisskipanini

**18.20.00-I00-1-17**

## 5. Umsókn frá TB fótbóltur um stuðul

### Málsfrágreiðing

TB fótbóltur hevur fingið nýggja starvsnevnd í november mánaða í fjør, og nú roynir nýggja nevndin at fáa enn betur skipaði fíggjar-viðurskifti í felagnum. Starvsnevndin søkir um at fáa tillutað verandi játtan á 300. tús. kr. aftur í 2017 umframt eina upphædd sum gávu í sambandi við at TB hevur 125 ára føðingardag í mai mánaða í ár. Henda umbøn um gávu bleiv umrødd av Býráðnum í oktober mánaða í fjør í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini 2017 á Hotel Vágum. Í sambandi við hesa viðgerð av fíggjarætlanini, samtykti Býráðið, at veita TB fótbólti 100. tús. kr. í stuðli sum gávu í sambandi við 125 ára føðingardagin í mai mánaða í ár, sí viðfestu skjøl.

**Býráðið, 13. februar 2017, pkt. 7:**

Býráðið tók einmælt undir við, at TB brúkar fótbóltsvøllin við Stórá. Býráðið tók kunningina frá Henrik Thomsen, varaformanni í TB, til eftirtektar, og málið verður tikið fram aftur til viðgerðar í mars mánaða.

**Mentanarnevndin, 27. februar 2017, pkt. 7:**

Mentanarnevndin samtykti einmælt ikki at stuðla umsóknini frá TB fótbóltur um kr. 100.000,- í gávu, men at varðveita núverandi stuðul á kr. 300.000,-

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2017 |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Fíggjarnevndin, 6. mars 2017, pkt. 5:**

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini um at varðveita núverandi stuðul á kr. 300.000,- tí hetta er ein góður stuðul í mun til hvat aðrar kommunur stuðla við umframt tann stuðul, sum Tvøroyrar kommunu letur við at TB kann brúka vøll og ítróttarhús við Stórá ókeypis. Málið beint til víðari viðgerð í Býráðnum.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt at játta kr. 300.000,- í stuðli til TB fótbóltur fyri árið 2017. Harumframt ókeypis brúk av vølli og húsið.

### Skjøl

- Stuðul til TB í.s.v. 125 ára føðingardag
- Fundarfrásøgn frá Henrik Thomsen
- Fíggjarætlan hjá TB fyri 2017
- Roknskapur hjá TB 2016
- Frágreiðing í sambandi við fund við leiðsluna í TB
- Samskifti við Henrik Thomsen, varaformann í TB, um at møta á býráðsfundi í dag

**00.01.10-I00-9-17**

## 6. Áheitan á kommununa, um at hýsa almennum stovnum

### Málsfrágreiðing

Áheitan frá Bergi Stórhamar um, at Tvøroyrar kommuna bjóðar seg fram at hýsa almennum stovnum eisini sæð í ljósinum av, at bygnaðurin av Søvnum Landsins verður endurskoðaður.

### Avgerð

Býráðið helt áheitanin frá Bergi Stórhamar var áhugaverd og vil í framtíðini hava í huga at fáa landsstovnar lagdar út til Tvøroyrar.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2017 |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Svar til Bergur Stórhamar
- Áheitan frá Bergur Stórhamar

**27.00.00-6-14**

## 7. Tilmæli um bygginevnd í.s.v. fyrireiking av útbygging av barnagarði

**Málsfrágreiðing**

Við støði í viðgerð í teknisku nevnd hevur býarverkfrøðingur Tummas Sørensen gjørt eitt tilmæli um bygginevnd í sambandi við fyrireiking av útbygging av barnagarðinum Mýrifípan, sí viðfesta tilmæli.

**Tekniska nevnd, 6. mars 2017, pkt. 2:**

Mælt verður til at býráðið skjótast gjørligt setir eina bygginevnd..

**Avgerð**

Tvey tilmælir:

Súsanna Bertholdsen mælir til, at Bjarni Hammer avloysir Anitu Vibergsdóttir í bygginevndini. 3 atkvøður fyri tilmælinum hjá Súsonnu Bertholdsen: Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen. 4 atkvøður ímóti tilmælinum hjá Súsonnu Bertholdsen: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Kambskarð Sørensen og Alvi Mortensen.

Tekniska nevnd hevur gjørt tilmæli við 8 fólkum, sí viðfesta skjal. 4 atkvøður fyri tilmælinum hjá teknisku nevnd: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Kambskarð Sørensen og Alvi Mortensen. 3 atkvøður ímóti tilmælinum hjá Teknisku nevnd: Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen.

Tilmæli frá teknisku nevnd er sostatt samtykt.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2017 |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Móttøkuváttan í.s.v. tilmæli um bygginevnd
- Tilmæli til bygginevnd til útbygging av barnagarðinum.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2017 |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin 17:55**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Kambskarð Sørensen

Alvi Mortensen

Bjarni Hammer



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2017 |
| Fundardagur | 13. marts 2017 kl. 17:00-17:55 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen



Formansváttan